# Nógv nýggj andlit í Tinganes

**Tað verða sjey fólk í nýggja landsstýrinum og eftir øllum at døma verður talan um nógv nýggj andlit. Mong eru boðini og gitt verður dúgliga. Nøkur av boðunum eru Bárður Nielsen til fíggjarmál, Jógvan á Lakjuni til mentamál og Andreas Petersen ella Hans Pauli Strøm til heilsu- og almannamál**



*Enn eru eingin nøvn sett á landsstýrissessirnar, bara ein er vissur, og tað er løgmanssessurin, sum eftir øllum at døma fer til formann Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard*

NÝTT LANDSSTÝRI
*Jan Müller*

Nógv virksemi hevur verið á Gamla Apoteki síðani samráðingar um nýtt landsstýri byrjaðu fyri umleið eini viku síðani, og í endaspurtinum hósdagin og fríggjanáttina slapp møguliga komandi samgongan at standa sína roynd. Hósdagin vildi Fólkaflokkurin hava at vita frá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum, hvønn hugburð teir høvdu til at fáa Anfinn Kallsberg út í Tinganes aftur. Hetta var eftir øllum at døma ein liður í tí taktiska spælinum, nú málsøkini skuldu býtast millum flokkarnar. Fólkaflokkurin vildi við hesum stigi gera greitt, at hann fór at seta stór krøv, slapp Anfinnur ikki aftur í landsstýrið. Eisini metti hann tað vera heilt rímuligt at krevja tríggjar landsstýrissir, nú Javnaðarflokkurin fekk løgmann og Sambandsflokkurin fekk tingformannin.

Bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin gjørdu greitt, at teir kundu ikki góðtaka Anfinn Kallsberg í landsstýrinum og eftir tað var hektiskt virksemi. Eina løtu ljóðaði, at Tjóðveldisflokkurin møguliga vildi góðtaka Anfinn Kallsberg sum løgmann kom gamla samgongan afturíaftur. Hetta hevur tó helst verið partur av tí psykologiska krígnum, sum valdaði í apoteksumhvørvinum hósdagin og hóskvøldið.

Talið á landsstýrisfólki kom so niður á 7 eftir telvingina hósdagin. Áðrenn blaðið fór til prentingar ljóðaði, at Javnaðarflokkurin umframt løgmann, sum skal umsita málini hjá Løgmáláráðnum, eisini fær almanna- og heilsuøkið. Hetta økið hevur verið undir tveimum landsstýrismonnum í undanfarnu samgongu. Men tað hevur eisini ljóðað, at Javnaðarflokkurin hevur verið úti eftir Innanríkisráðnum, sum hann sjálvur er faddur at. Tað ljóðar eisini, at Sambandið vil hava hetta málsøkið og uppaftur aðrar gitingar vilja vera við, at har verður einki Innanríkisráð. Tað er tó ósannlíkt, tí tað er sjeynda ráðið.

Sum skilst leggur Fólkaflokkurin seg eftir at fáa Vinnumál og Fiskivinnumál men hevur eisini roynt at fáa Fíggjarmálini. Okkurt tykist tó benda á, at Sambandsflokkurin fer avstað við Fíggjarmálum, og at tað kann henda, at Fólkaflokkurin tá fær Menta- og skúlamál. Hitt málsøkið hjá Sambandsflokkurin verður so helst Innlendismál.

Ringt er at seta persónsnøvn á men í tí politiska umhvørvinum eru fleiri boð og har verður gitt dúgliga. Sannlíkt er at Bjarni Djurholm heldur fram við vinnumálum, og Jákup Vestergaard við fiskivinnumálum. Fær Fólkaflokkurin Fíggjarmál, so flytur Bjarni Djurholm út í Albert Hall. Men fær Sambandið fíggjarmálini, so kann nýggi maðurin har koma at eita Bárður Nielsen. Fær Fólkaflokkurin mentan og útbúgving er Jógvan á Lakjuni eitt gott boð. Um Javnaðarflokkurin fær Almanna- og heilsumál verður tosað um Andreas Petersen, men gitt verður eisini, at Hans Pauli Strøm stendur klárur til henda so týðandi og stóra sessin.

Øll samráðingarfólkini svóvu tá blaðið allan fríggjamorgunin royndi at fáa viðmerkingar til tey ymsu málsøkini. Fundur skuldi vera aftur á Gamla Apoteki klokkan 14 í gjár.









*Fleiri boð eru uppá landsstýrisfólk. Bárður Nielsen er boð uppá fíggjarmálaráðharra, Jógvan á Lakjuni uppá mentamálaráðharra og í Javnaðarumhvørvi verður tosað um Andreas Petersen ella Hans Paula Strøm at taka sær av heilsu og almannaøkinum*

## Stríðast um fiskivinnumál



Ein tann seinasti knúturin í samgongusamráðingunum snýr seg eftir øllum at døma um, hvør skal hava fiskivinnumálini. Tað ljóðar, at Sambandið og Fólkaflokkurin togast um málsøkið. Fær Sambandið tað, sum er sannlíkt, so verður landsstýrismaðurin helst Alfred Olsen. Tá fær Fólkaflokkurin so Innlendismálini og ráðharrin verður Jákup Vestergaard.



# Sjey er gylta talið

**Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin eru komnir ásamt um, at aðalráðini skulu verða sjey í tali. Løgmálaráðið og Oljumálaráðið fella burtur og Almanna- og Heilsumál verða løgd saman aftur. Eitt nýtt Innlendismálaráð verður eisini sett á stovn**

AÐALRÁÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Jóannes Eidisgaard er á trappuni til gerast komandi løgmaður Føroya. Javnaðarflokkurin , Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin hava sett talið av aðalráðum til at verða sjey. Nú restar bara býtið í av málsøkjum, áðrenn ABC-samgongan verður veruleiki.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Á Gamla Apoteki hava Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin dúgliga kjakast um, hvussu nógv aðalráðini skulu vera í tali. Eftir drúgvar samráðingar, eru flokkarnir komnir ásamt um, at aðalráðini skulu lækka úr níggju niður í sjey. Sammett við almennu fyrisitingina í dag, detta tvey aðalráð burtur. Almanna- og Heilsumálaráðið skulu eisini leggjast saman aftur, meðan eitt spildur nýtt Innlendismálaráð verður sett á stovn.

Talið av aðalráðum var eitt av høvuðsevnunum undir valstríðnum. Allir flokkar á tingi søgdu seg vilja hava færri aðalráð og nú hava so Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin avgjørt at fækka talið.

Semjan millum flokkarnar fevnir um: Løgmansskrivstovu. Fíggjarmálaráð, Almanna-og heilsumálaráð, Fiskimálaráð, Vinnumálaráð, Mentamálaráð og Innlendismálaráð.

### Umskipanir

Í valstríðnum var Javnaðarflokkurin einasti flokkur, sum meldaði greitt út, at almenna fyrisitingin skuldi ikki fevna um fleiri enn seks aðalráð. Javnaðarflokkurin hevur kortini gingið við til sjey aðalráð.

– Tað hevur verið ein langur og seigur dystur at finna eina semju. Vit høvdu lagt okkum eftir at fækka talið til seks, men tað gjørdist ein spurningur um at viga teir ymisku postarnir og tí er endaliga talið blivi sjey, greiðir samráðingarleiðarin, Jóannes Eidesgaard frá.

Jóannes Eidesgaard sipar til, at løgmansessurin og starvið sum tingformaður skuldi eisini takast við í telvingina um býtið av landsstýrissessum.

At fækka talið av aðalráðum úr níggju niður í sjey hevur fleiri umskipanir við sær. Ætlanin er, at Innlendismálaráðið skal taka sær økinum sum bæði Løgmálaráðið og Oljumálaráðið hava umsitið seinasta samgonguskeið. Her verður hugsað um lógarmál, oljumál, økismenning, kommunumál. Ætlanin er eisini, at strandferðlan skal flytast frá vinnumálum til innlendismál.

Okkum hevur ikki eydnast at fáa ítøkiligt at vita, hvørji mál hini aðalráðini fara at umsita, men sum skilst, so verða ikki tær stórvegis broytingarnar framdar.



*Løgmaður, Anfinn Kallsberg, verður hvørki løgmaður ella landsstýrismaður í eini møguligari ABC-samgongu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Anfinn Kallsberg leggur kongin

**Anfinn Kallsberg ásannar, at hann skal ikki rokna við einum landsstýrissessi í eini samgongu millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin. Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava boðað løgmanni frá, at teir hava ikki álit á honum**

SAMGONGUTELVING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Gamla Apotek 22.50:

Samgongusamráðingarnar millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin hava nú vart í eina góða viku. Nógv er fingið av skafti og útlitini fyri eini ABC-samgongu gerast alsamt bjartari. Flokkarnir hava funnið semju um øll málsøkini og hóskvøldið skulu seinastu leikirnir í samgongutalvinum gerast.

Undir samráðingunum seinastu vikuna hevur málið um Anfinn Kallsberg ikki verið umrøtt. Hóskvøldið brast kortini fyri nevið. Anfinn Kallsberg verður hvørki løgmaður ella landsstýrismaður í eini samgongu millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkin

### Skuffaður

Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava boðað løgmanni frá, at flokkarnir hava ikki álit á honum. Hesa støðu, hevur Anfinn Kallsberg tikið til eftirtektar og hann ásannar, at hann verður ikki partur av landsstýrismanningini í eini ABC-samgongu.

Løgmaður sigur seg ikki vilja gerast ein forðing hjá Fólkaflokkinum í samgongusamráðingunum við Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin og tí verður hann noyddur at boyggja seg.

– Hóast stórur partur av føroya fólki vil hava meg sum løgmann og eg júst havi havt eitt rimmar val, so má eg vera realistiskur. Eg eri demokratiskt valdur, men mann vil ikki virða at fólki hevur talað. Eg eri skuffaður av Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum at eg ikki kann fara í landsstýrið, sigur Anfinn Kallsberg.